bústa∂ir
Føroya bústaðafelag

Yviri við Strond 6
Postsmoga 215
FO-110 Tórshavn
Tlf. 401000
www.bustadir.fo

Til
Umhvørvismálaráðið

13. mars 2023
Tykkara mál nr.: 23/05362-9

Hoyringssvar

Viðvíkjandi "Uppskot um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn"

Í sambandi við løgtingsmál LM-064/2020, sum bleiv til , Løgtingslóg nr. 34 frá 26. mars 2021, gjørdi Bústaðir vart við, at felagið ynskti at hava møguleikan fyri at stovna partafeløg við tí endamáli at deila eigaraskapin av ymiskum verkætlanum við aðrar íleggjarar og soleiðis fáa fíggjarligu heimildirnar at røkka longri, enn um Bústaðir einsamalt skuldi eiga allar verkætlanir.

Bústaðir hevur havt samskifti við aðrar íleggjarar um at fáa hesar at verða við í einum deildum eigaraskapi av fleiri ymiskum verkætlanum, og Bústaðir vænta at fleiri avtalur hesum viðvíkjandi kunnu kunngerast í næstum
Í fyriliggjandi lógaruppskoti verður grundgivið soleiðis:
"Í summum førum kann tað vera skynsamt, at Bústaðir samstarvar við aðrar íleggjarar um bústaðarbygging. Soleiðis røkkur peningurin, sum Bústaðir hevur heimild at upptaka lán fyri, longri. Somuleiðis eru slíkar verkætlanir ein partur av at tryggja fjølbroytni og at fáa fleiri við til at loysa bústaðartrupulleikan. Tað avgerandi við lógarbroytingini er, at Bústaðir fær frælsi til at meta um og gera av, hvørjar verkætlanir stovnurin skal fremja einsamallur og, hvørjar verkætlanir best vera framdar saman við øðrum. Soleiðis røkka vit best politisku endamálunum fyri Bústaðir."

Bústaðir tekur undir við hesi grundgeving, og kann leggja afturat, at fleiri verkætlanir eru ov lítlar og av einum slag, har ein deildur eigaraskapur ikki er hóskandi ella letur seg gerða. Harumframt gevur tað Bústaðir fleiri møguleikar um ein deildur eigaraskapur ikki er eitt krav. Bústaðir vil sum meginregla royna at fáa aðrar íleggjarar við í verkætlanirnar, soleiðis at røkkast kann longri og eftirspurningurin eftir leigubústøðum betri kann nøktast bæði í miðstaðar økinum og úti um landið.

Umframt at Bústaðir sostatt tekur undir við verandi lógaruppskoti, hevur Bústaðir eisini fylgjandi ynskir til broytingar í verandi løgtingslóg nr. 34 frá 26. mars 2021:

- At karmurin í § 8 c stk. 2 verður hækkaður úr 250 mió. kr. til 450 mió. kr. til at fíggja bústaðarbygging kring landið. Orsøkin er, at ofta er talan um ein tíðarforskjóting millum at Bústaðir ger arbeiðstakarasáttmálar (sum fígging skal havast til) og til at aðrir íleggjarar koma uppí í einum deildum eigaraskapi. Í tann mun, at tað ikki fer at bera til at gera skynsamar avtalur við aðrar íleggjarar um felags verkætlanir, kann verandi fíggjarkarmur á 250 mió. kr. til bústaðabygging kring landið vísa seg at røkka ov stutt, til at Bústaðir kann byggja eitt hóskandi tal av leigubústøðum.

- At avmarkingin í § 8 b um at talan skal verða um *"...at skriva út lánsbrøv til íleggjarar í Føroyum, við at taka lán frá stovnsligum íleggjarum í Føroyum ella við bankaláni úr føroyskum banka"* verður sleptur. Orsøkin er, at møguleiki skal verða fyri, at Bústaðir altíð kann fáa fígging til bestu marknaðartreytir, og at Bústaðir sum einstakur lántakari kann gerast ov stórur fyri føroysku bankarnar og stovnsligu íleggjararnar.
- At orðingin av § 8 d. sum sigur: *"Húsalánsgrunnurin kann stovna partafeløg til virksemi fevnt av § 8 c, stk. 1 og 2, treytað av at verkætlanin hevur ein ella fleiri íleggjarar",* verður broytt. Sum er verður hetta av aðalráðnum tulkað soleiðis, at Bústaðir skal stovna eitt partafelag fyri hvørja verkætlan, sum felagið fer í gongd við saman við øðrum. Bústaðir metir tað verða skynsamari, at Bústaðir stovnar eitt holdingfelag, sum kann rúma eigaraskapin av Bústaðirs' parti av felags verkætlanum í einum ella fleiri dóttirfeløgum umframt tað virksemið, sum er knýtt at hesum.

Bústaðir – Føroya Bústaðafelag (Húsalánsgrunnurin)
Tórshavn t. 13. Mars 2023

Andras Róin, stjóri